Vi›merking

Jógvan Mørkøre umbo›ar ikki kommunurnar

Nú uppskoti› um at leggja barnaansingina út til kommunurnar er framlagt á tingi, hava loftimi›larnir gjørt nógv burturúr at fortelja Føroya fólki, at kommunurnar als ikki ynskja lógina setta í verk.

Bæ›i Útvarpi› og Sjónvarpi› hava tí›indini frá formanninum í Føroya Kommunufelag, sum eftir øllum at døma ikki ynskir, at kommunurnar í Kommunufelagnum taka ábyrgd av børnunum í teirra kommunum.

Tá i› tí›indini eru bor›in fram, siga mi›larnir, at kommunurnar ikki ynskja lógina um dagstovnar og dagrøkt setta í verk. Hetta er beinlei›is skeivt. Føroya Kommunufelag umbo›ar umlei› 1/3 av Føroya fólki, me›an Kommunusamskipan Føroya umbo›ar hinar bá›ar tri›ingarnar.

Tórshavnar Kommuna, sum einsamøll umbo›ar umlei› 1/3 av Føroya fólki, ella naka› ta› sama fólkatali›, sum alt Kommunufelagi›, er als ikki samd vi› formanninum í Kommunufelagnum. Vit eru tvørturímóti sera fegin um, at ein føroysk barnagar›slóg endiliga er á veg. Hetta hóast vit langt frá halda lógina ver›a nøktandi.

Eitt nú eru vit ósamd vi› lítla kommunufelagi› um, hvør skal starvast á dagstovnunum. Kommunufelagi› vil eftir øllum at døma ikki hava námsfrø›ingar at starvast har. Fyri okkum er ta› líka so ney›ugt at ta› eru námsfrø›ingar sum starvast á barnagør›unum, sum at ta› eru lærarar, sum starvast í fólkaskúlunum.

Elin Lindenskov
forkvinna í sosialunevnd
Tórshavnar b‡rá›

Hvør kann kenna seg tryggan?

Løgtingi› hevur júst havt a›alor›askifti um uttanlandsfrágrei›ing løgmans. Í hesi frágrei›ing ver›ur millum anna› sagt um sáttmálasamrá›ingarnar millum Føroyar og Danmark, at fólk kunnu kenna seg trygg vi› hesar samrá›ingar. Tær skulu leggja lunnar undir eina menning ímóti einum sjálvstø›ugum føroyskum samfelag, har ábyrdin ver›ur á føroyskum hondum.

Pensjonisturin, sum ikki kundi fáa pensjónina útgoldna til jóla, skal kenna seg tryggan. Sjúklingurin, sum dagliga hoyrir um samstarvstrupulleikar millum læknar og sjúkrasystrar, skal kenna seg heilt tryggan. Vanligi føroyingurin, sum dagliga sær eitt skúlaverk, almannaverk og heilsuverk, i› liggja í skeljasori, skal eisini kenna seg tryggan. Og tey sum sita umbor› á okkara gomlu strandfaraskipum, skulu eisini kenna seg trygg, hóast peningurin, i› kundi veri› n‡ttur til vi›líkahald og n‡íløgur, ver›ur n‡ttur til at fíggja loysingina vi›.

Men her er ikki gott í vantu, tí um loysingin gerst veruleiki, so skal munandi meira sparast, enn ta›, sum vit síggja í dag. Taka vit so eisini vi› í roknistykki›, at fiskaprísirnir hava veri› methøgir, og fiskanøgdirnar óvanliga stórar, so er ikki ringt at gita, hvørja ávirkan ta› fær, tá tey vi›urskiftini normalisera seg aftur.

Ábyrgd ella ábyrgdarloysi

Or› sum ábyrgd", ver›a ofta n‡tt í sambandi vi› loysingarætlan landsst‡risins. - Vit skulu taka ábyrgd av egnum landi og egnum vi›urskiftum. - Evsta vald og evstu ábyrgd o.s.fr. Men er ta› ábyrgd, at lata tey veiku í samfelagnum lí›a undir, at landsst‡ri› vil hava størri vald? Er hetta ikki júst ábyrgdarloysi?

Er ta› ikki júst ábyrgdarkensla, sum fær nakrar politikarar at siga "nei" til fullveldi, tá teir síggja, at fjøldin av føroya fólki ver›ur tapari?

Eg spyrji bara, hvussu sitandi landsst‡ri skal leggja lunnar undir eina menning av føroyska samfelagnum (uttanfyri ríkisfelagsskapin) tá teir ikki megna dagliga vi›líkahaldi› í dag?

ES

Í uttanlandsfrágrei›ingini, kemur løgma›ur eisini inná spurningin um ES. Ta› ver›ur nevnt, at ætlanin er at fáa eina EBS-líknandi skipan, men í sama andadrátti ver›ur eisini sagt, at hetta er ein skipan sum skjótt ikki ver›ur til longur.

Tí skilji eg ikki, at mi›a› ver›ur eftir eini skipan, sum kanska ver›ur farin úr gildi, á›renn hon ver›ur samtykt.

Hví so ikki heldur royna onkra a›ra samrá›ingarloysn vi› ES? Hví ikki royna samrá›ingar um limaskap vi› undantøkum, sum fleiri a›rar oyggjar hava, eitt nú Áland?

Eingin kennir treytirnar

Eingin veit rættiliga, hvat ES-limaskapur hevur at t‡›a fyri Føroyar, tí ikki fyrr enn vit hava sent eina umsókn um limaskap, og hava samrátt okkum fram til ein sáttmála, vita vit, hvat ES er fyri naka›. Ikki fyrr enn tá, kenna vit treytirnar, og tí er ta› ov tí›liga at vera ímóti, á›renn vit vita, hvørjum vit eru ímóti.

Mær tykir, at ta› gongur ov seint vi› at skunda undir ví›ari samrá›ingar vi› ES. Men hvussu kann naka› ganga skjótt? Fólk í umsitingini hava n‡tt alla orku til at fyrireika loysingina, og fyri henni má alt anna víkja.

Sitandi landsst‡ri ra›festir loysing frá Danmark hægri, enn markna›aratgongd til okkara stórsta samhandilspartnara, - og kortini skulu øll kenna seg trygg.

He›in Mortensen
løgtingsma›ur

Opi› bræv til Almanna- & heilsumálast‡ri›

Á fundi á Tvøroyri 11. februar vóru seks av teimum átta politisku feløgunum í Su›uroynni og tríggir av løgtingsumbo›um okkara møtt saman vi› lei›sluni fyri Su›uroyar Sjúkrahúsi. Eisini møtti eitt umbo› fyri pressuna.

Fundurin var fingin í lag fyri at lei›slan á Su›uroyar Sjúkrahúsi kundi leggja síni sjónarmi› fram, nú ta› vísti seg at játtanin fyri 2000 ikki kom at halda og at fólk tí máttu sigast upp.

Ta› var skelkandi at síggja hvussu illa Almanna- og heilsumálast‡ri› vi› frábo›an um at fíggjarætlanin ikki fór at halda, tí ta› fóru at resta 2 mill. (1,5 mill) í og ney›ugt var› at siga starvsfólkum upp. Hóast fleiri brøv vóru send til nevnda st‡ri fekk Su›uroyar Sjúkrahús einki svar. Og tá kanna hevur veri› eftir, vísir ta› seg at fíggjarnevndin onga frábo›an hevur fingi› um tørvin hjá Su›uroyar Sjúkrahúsi. Hetta prógvar at Almanna- & heilsumálast‡ri› als ikki virkar.

Su›uroyar Sjúkrahús var útbygt fyri fáum árum sí›ani. Hetta var har›liga tiltrongt, tí umstø›urnar vóru ótolandi. Hóast hesa útbygging eru ikki fleiri fólk sett í starv, og tessvegna er játtanin ikki vaksin av hesi orsøk.

Vit mugu tí har›liga átala mannagongdina hjá Almanna- og heilsumálast‡rinum í hesum máli og heita á st‡ri› um at fáa loyst hetta álvarsmál í skundi, so uppsøgnirnar á Su›uroyar Sjúkrahúsi kunnu ver›a tiknar aftur, tí sum stø›an er nú, kemur hetta at fáa álvarsligar fylgir fyri Su›uroyar Sjúkrahús, starvsfólkini og ikki minst fytri sjúklingarnar.

Slík stø›a, sum Su›uroyar Sjúkrahús nú er komin í, má undir ongum umstø›um endurtaka seg.

Su›uroyar Fólkafloksfelag, Hvalbiar Javna›arfelag, Su›uroyar Sambandsfelag, Vágs Javna›arfelag, Mi›flokkurin, Su›uroyar Tjó›veldisfelag, Fro›biar Sóknar Javna›arfelag, Su›uroyar Sjálvst‡risfelag og Tvøroyrar Sosialdemokratiskafelag.

Okkara kokkar - 2000

Sending nr. 1
Gudmundur saman vi› Jørgen Niclasen, landsst‡rismanni

Fiskasuppa í brey›i - loypt spragga vi› rey›ari piparfruktsós og ristimbale í purru

Suppan - hetta skalt tú brúka:
1 l. av fiskaso›i
100 gr. av jákupsskeljum
100 gr. av rækjum
100 gr. av kryddurtum í álum
salt og pipar
maisena

Solei›is gert tú:
1. Set so›i›, kryddurtir, salt og pipar útá í gr‡tu,
2. Fá alt uppá kók og ger útá vi› maisenu.
3. Legg fiskin í og stoyt róman í.

Fiskur og sós:
800 gr. av spraggu
2 rey›ar piparfruktir
1 l. av fiskaso›i
1 purru
400 gr. av basmati rísi
2.d dl. av róma.

Byrja vi› sósini:
1. Set fiskaso›i› at kóka
2. Sker piparfruktirnar í stórar bitar og koyr teir í hvirluna
3. Stoyt so›i› omaná og mal til ta› ver›ur ljósareytt.
4. Stoyt aftur í gr‡tuna, ger útá og koyr róma í.
5. Legg fiskin á eina pannu og dampa hann undir loki -hann má ikki kóka.

Brey›:
100 gr. av geri
1/2 l. av flógvum vatni
1/2 l. av jogurt
2 spsk. av sukri
1 spsk. av salti
mjøl

Solei›is gert tú:
Elt deiggi› sum alt anna› vanligt brey›deiggj, men minst til at lata deiggi› ganga í uml. 3 tímar.

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

FCK spældi javnt í Suðurafrika

Umstøðurnar at spæla fótbólt eru hesa ársins tíðina stak góðar í Suðurafrika

Eftir at hava verið í eitt hálvt samdøgur komu Todi Jónsson og hinir í FCK mánadagin til Suðurafrika, og týsdagin var fyrsti dysturin á næstan tvær vikur longu venjingar– og dystarferðini á skránni.

FCK spældi ímóti einum liði, sum eitur Park United, og úrslitið var 1–1. Bæði málini vórðu skorað í 1. hálvleiki. Málskjútti hjá FCK var Christian Lønstrup. Hann hevur annars verið nógv skaddur, og tað eru næstan tvey ár síðani, at hann síðst skoraði mál fyri FCK.

Christian Lønstrup er miðvallari, men tað tykist ikki vera nakar vandi fyri, at hann fer at taka plássið frá Toda Jónsson. Tá FCK leygardagin vann 2–0 móti IFK Göteborg í Parkini var Lønstrup mitt á miðjuni, og Todi spældi í vinstu. Í blaðnum týsdagin vistu vit ikki so nógv at siga um dystargongdina, men síðani hava vit frætt, at hesir báðir miðvallararnir vóru bestu spælararnir hjá FCK. Tá Thomas Thorningar, sum beinanvegin eftir steðgin kom inn á miðvøllin í høgru, skoraði fyrra málið, var tað eftir at Todi Jónsson hevði brotið ígjøgnum í vinstru.

Góðar umstøður

Ferðin til Suðurafrika er ein liður í fyrireikingunum hjá FCK til seinnapartin av kappingarárinum, sum tað verður farið undir á grækarismessu. Og tað kann ikki sigast annað, enn at umstøðurnar eru góðar at spæla fótbólt í Suðurafrika. Veðrið har niðri nú er, sum tað er í Danmark um summarið.

Í Danmark eru grasvallirnir hesa ársins tíðina tungir og vátir, og tað ber verri enn so altíð til at spæla á teimum. Í Suðurafrika andar alt av sól og summar, og tað vil siga, at tað næstan ikki ber til at ímynda sær betri umstøður enn tær, sum FCK venur og spælir dystir undir í hesum døgum.

JH

Ayr kom víðari

Føroyska felagið í Skotlandi megnaði í gjár at vinna á Premier League liðnum, Dundee

Jákup Mørk

Eftir at fyrri dysturin millum liðini bæði endaði við málleysum javnleiki, skuldi dysturin millum Ayr United og Dundee í skotsku steypakappingini hesu ferð avgerast.

Tað varð hann eisini, men neyðugt varð við bæði longdari leiktíð og sektaspørkum, áðrenn endaligi vinnarin varð funnin.

Tá 90 minuttir vóru leiktir, stóð framvegis á jøvnum 0-0, men longu í fyrsta minuttinum av longdu leiktíðin eydnaðist tað Gavin Rae at leggja Dundee fram um 1-0.

Stórt trýst

Eftir hetta legði Ayr Utd. stórt trýst á mótstøðumálið, og m.a. varð eitt skot frá Glynn Hurst bjargað á sjálvari málstrikuni.

Tá 104 minuttir vóru leiktir eydnaðist tað tó liðskiparanum, Neil Duffy, at seta kollin undir eitt hornaspark, og so stóð aftur á jøvnum. Hurst hevði seinni tveir møguleikar at avgera dystin, men inn vildi bólturin ikki, og tískil varð neyðugt við sektaspørkum.

Úrslitið varð, at Ayr vann 7-6, og eru teir tískil framvegis við í pottinum, tá lutakast verður um, hvussu 16 tey seinastu liðini skulu leika.

Sum vanligt sat Jens Martin Knudsen millum áskoðararnar undir dystinum, meðan Jens Kristian Hansen lá heima í seingini sjúkur.

Sama sjúkan var eisini orsøkin til, at hann í seinasta dystinum hjá Ayr varð skiftur út eftir einans góðan hálvan tíma.

Regin og Ingun vunnu

Úrslitini frá Grand-Prix kappingini um vikuskiftið

Jákup Mørk

Seinasta vikuskifti varð enn eitt umfar leikt í Grand-Prix kappingini í Badminton.

Kappast varð í einmansleiki í barna- og vaksnamannadeildunum, og framganga úrslitini av ymsu kappingunum niðanfyri.

Hetta var samstundis næst seinasta Grand-Prix kappingin hjá teimum yngru leikarum, sum um stutta tíð skulu til Vestmanna, har endaspælið skal avgreiðast.

Gentur upp til 10 ár:
Nr. 1, Brynhild Carsson, HBF
Nr. 2, Agnas Olsen, VÍF

Dreingir upp til 10 ár:
Nr. 1, John André Niclasen, ÍF
Nr. 2, Magnus á Rógvu, VÍF

Gentur 10-12 ár:
Nr. 1, Ulla í Dávastovu. VÍF
Nr. 2, Rannvá á Rógvu, VÍF

Dreingir 10-12 ár:
Nr. 1, Niclas Eysturoy, HBF
Nr. 2, Hilmar Kass Jacobsen, HBF

Gentur 12-14 ár:
Nr. 1, Lis Christoffersen Hansen, VÍF
Nr. 2, Elisabeth Petersen, VÍF

Dreingir 12-14 ár:
Nr. 1, Thomas Rubeksen, HBF
Nr. 2, Gunnar Poulsen, HBF

Dreingir 14-16 ár:
Nr. 1, Hanus Eliasen, ÍF
Nr. 2, Høgni Madsen, ÍF

Mansunglingar:
Nr. 1, Bjartur Lamhauge, HBF
Nr. 2, Aksel Poulsen, HBF

Kvinnur:
Nr. 1, Ingun Hansen, Strálan
Nr. 2, Elin Jacobsen, HBF

Menn:
Nr. 1, Ragnar Rasmussen, HBF
Nr. 2, Regin Hammer, HBF



Herfølge tapti í Valby

Frem, sum fór á húsagang og noyddist at spæla seriufótbólt, tykist av álvara at hava fótað sær aftur

Týskvøldið vóru Jákup Mikkelsen og teir í Herfølge í Valby í útsynningspartinum av danska høvuðsstaðnum. Har hevur gamla fótbóltsfelagið, Frem, sum verður sagt at hava sínar røtur í arbeiðararørsluni, heimavøll.

At siga at felagið hevur heimavøll í Valby er kanska ikki nóg neyvt. Í Valby er ein ørgrynna av fótbóltsvøllum. Har halda nógv smá fótbóltsfeløg til, og har verða nógvir fótbóltsdystir spældir. Eitt nú spæla liðini hjá føroyingunum í Keypmannahavn ofta á útivølli í Valby.

Frem hevur felagshús í Valby, og teir venja og spælla venjingardystir í Valby. Tá teir spæla landskappingardystir og steypadystir verður spælt á framsýningarvøllinum í ítróttarparkini í Valby.

Týskvøldið var Herfølge á einum av venjingarvøllunum hjá Frem. Heimaliðið vann 3–1, og tað var einki serligt hjá Jákupi og teimum. Leygardagin fara teir til La Manga í Spania at stríðast við norsk og svensk fótbóltsfeløg, sum – á pappírinum í hvussu so er – eru væl betri fyri, enn Frem er.

Fyri nøkrum árum síðani fór Frem á húsagang. Teir hoyknaðu, tí inntøkurnar megnaðu ikki at rinda útreiðslurnar, sum øktust stútt og støðugt.

Avleiðingin av húsaganginum var, at Frem varð sent úr bestu deildini og noyddist í staðin at spæla seriufótbólt. So at siga allir teir bestu spælararnir rýmdu. Útreiðslurnar vórðu lagaðar til nýggju fyritreytirnar. Tað vil millum annað siga, at eingin fekk pengar fyri at spæla fótbólt í Frem. Í staðin fóru teir aftur at dúva uppá felags anda og kenslu, og tað hevur gingið væl.

Frem er nú í 1. deild. Har eru teir á fimta plássi, og møguleikin fyri at flyta upp í bestu deildina verður framvegis mettur at vera til staðar. Úrslitið týskvøldið móti oddaliðnum í superliguni boðar frá, at Frem er væl fyri.

JH

Herfølge og Jákup Mikkelsen taptu seinastu dystin áðrenn farið verður til La Manga á venjingarlegu